


# Stjørnan ið hvarv

**FLØGUÚTGÁVA**
*Tíðindaskriv*

Útvarp Føroya hevur givið út fløguna Stjørnan ið hvarv. Orð og løg byggja á ævintýrsøguna, ið var evnið í jólakalendaranum hjá útvarpinum í 2002.

Katrin Nolsøe Joensen og Kári Sólstein hava skrivað søguna, ið fer fram í ævintýrlandinum Regnum. Niclas Johannesen og Lena Andersen hava gjørt tónleikin. Fleiri kendir tónleikarar luttaka á fløguni, og Eyðun Johannesen er frásøgumaður. Edvard Fulgø hevur gjørt kápumyndina og prýtt húsan.

Stjørnan í hvarv fæst kring alt landið, og er ein góð jólagáva til bæði børn og vaksin.

# Skúlaskipið Dragin á alnetinum

**Nú kunna tey, ið hava áhuga í skúlaskipinum, Dragin í Klaksvík, fara á alnetið at leita sær upplýsingar skipið**

**SKÚLASKIP**
*Tíðindaskriv*

Skúlaskipið "Dragin" varð tikið í nýtslu í summar eftir eina langa og stóra umbygging til segl- og skúlaskip. Siglt varð við skúlanæmingum eins og útferðir vóru gjørdar við ferðafólki, firma-leigutúrar, fiskitúrar og eisini var ein uttanlandatúrur gjørdur til Hetlands.

Nú er ein heimasíða løgd út á alnótina, so skúlar, feløg og stovnar ella einstaklingar hava møguleika at bíleggja "Dragan" til komandi summar.

Á heimasíðuni ber eisini til at lesa søguna um "Dragan", síggja myndir og lesa ymist áhugavert.

Heimasíðuadressan hjá "Draganum" er: www.dragin.fo

Tað er Tórshavnar Skipasmiðja, ið stuðlar heimasíðuni hetta fyrsta árið, hon liggur úti á netinum.






Bókadagur 2003

Bókadagur við bókacafé verður sunnudagin 30. november kl. 15 í Norðurlandahúsinum

**Skrá fyri Bókadagin 2003 í Norðurlandahúsinum**

**Kl. 15.00:** Bókaframsýningin letur upp
**Kl. 15.15:** Rithøvundafelagið bjóðar vælkomin
**Kl. 15.20:** Bárður Persson lesur egnar yrkingar
**Kl. 15.30:** *Loppugras.* Framløga av nýggju bókini hjá Sólrun Michelsen við myndum eftir Hanna Bjartalíð. Í bókini eru sangir, sum Palli Hansen hevur gjørt løg til. Børn syngja saman við Jóannu Johansen
**Kl. 15.50:** Jóngerð Poulsen lesur egnar yrkingar
**Kl. 16.00:** Hans Jacob Kollslíð lesur egnar yrkingar
**Kl. 16.10:** *Ikki av fiski eina.* Steintór Rasmussen sigur frá yrkingum sínum og lesur úr savninum
**Kl. 16.30:** Steðgur, har høvi verður at tosa við rithøvundar og útgevarar
**Kl. 17.00:** Oddfríður M. Rasmussen lesur úr nýggja savni sínum
**Kl. 17.10:** *Er Gud danskari?* Carl Jóhan Jensen hevur samrøðu við Alexandur Kristiansen
**Kl. 17.30:** Alexandur Kristiansen lesur
**Kl. 17.40:** Bókadagurin endar

SANSIR 355 355

NORÐURLANDAHÚSIÐ
Bókasølan
Tel. 31 95 75 · www.bokasolan.fo
RITHØVUNDAFELAGIÐ

veitst tú ikki tað? Sosialurin








## Tøkk

Hjartanliga takka vit øllum fyri sýnda samkenslu, tá pápi og beiggi okkara

**Wenzel Hentze**

doyði og varð jarðaður.

Tøkk til Sonju Klein, prest, fyri troystarrík orð. Tøkk til kirkjutænarar og sangarar. Tøkk fyri blómur og kransar, og tøkk øll tit, ið fylgdu honum til hansara seinasta hvíldarstað.
Tøkk til heima- og sjúkrarøktarar, bæði í Havn og Vágunum, og ikki minst til vinfólk, sum so trúliga vóru um hann undir drúgvu sjúkraleguni líka til tað seinasta.

**Bárður og Fríða**
**Elin, Annlott og Hjalgrím**

## Móttøka

**Í sambandi við 25 ára starvsdag**

Í sambandi við at Pætur Joensen, býarverkfrøðingur tann 1. desember 2003 hevur verið í starvi hjá Fuglafjarðar kommunu í 25 ár, so verður skipað fyri almennari móttøku í býráðshúsinum mánadagin 1. desember 2003 millum kl. 15.00-18.00

**Fuglafjarðar býráð**



# Kristel farin á flog

**Nýggjur føroyski sangfuglurin, 14 ára gamla Kristel Lisberg, er nú at hoyra á nýggjari stakfløgu**

**FLØGUÚTGÁVA**
*Tíðiindaskriv*

Á útgávuni eru tveir sangir, men tað er fyrst og fremst sangurin Ain´t no love (better than your sweet love), sum saman við røddini hjá nýfloygda sangfuglinum, ið skal standa sína rødd.

Sangurin er skrivaður av Lenu Andersen og Niclas Johannesen. Saman við Óla Poulsen hevur Niclas Johannesen producerað og lagt sangin tilrættis. Afturat Kristel Lisberg, syngja Lena Andersen, Kim Hansen og James Olsen kór á sanginum.

Ain`t no love er upptikin í JacZac í Havn og í Fix n Mix í Keypmannahavn 2003.

Á stakfløguni er eisini ein konsertupptøka av sanginum Blue Moon of Kentucky, sum Bill Monroe hevur skrivað. Hetta er ein bandað framførsla, sum var í Læraraskúlahøllini í 2001, tá Kristel sum einans var 12 ára gomul sang saman við pápa sínum Jens Lisberg.

Kristel hevur sungið frá tí hon var smágenta. Hetta seinasta árið er gentan, sum átti síni fyrstu barnaár á Tvøroyri, men sum síðani fór til Havnar at búgva, vorðin meira og meira kend kring Føroyaland. Í september 2003 fylti Kristel og pápi hennara Jens Lisberg høllina á Skála við tónleiki og bergtiknum áhoyrarum.

Ætlanin við nýggju stakfløguni er at geva føroyingum møguleikan at ogna sær hesi nýggju vøkru sangrødd, og samstundis at royna sangin uttanlands.

Tað er Jens Lisberg og Steintór Rasmussen sum saman hava fingið fløguna í lag og útgávan er vorðin veruleiki við góðum stuðli frá Føroya Banka.

Fløgan fer at kosta 59 krónur í handlunum.

Kristen er at síggja á sølustevnuni í Klaksvík í kvøld, fríggjakvøldið, kl 21, har hon eisini fer at signera fløgur.




# Jólini nærkast í hvørjum – eisini Leikhúsjólini...

**Eins og undanfarnu árini fer Havnar Sjónleikarfelag eisini í ár at bjóða bæði smáum og stórum til Leikhúsjól í Sjónleikarhúsinum**

**JÓL**
*Tíðindaskriv*

Rokast verður í hesum døgum við at leggja seinastu brikkarnar upp á pláss til fyrstu sýningina av Leikhúsjólum, sum verður hin 1. desember kl. 19.00.

Í ár er tað Elin á Rógvi, sum leikstjórnar ungfólki úr Havnar Sjónleikarfelag. Hon leikstjórnaði eisini vælumtókta »Kúlla Knúti« fyri góðum ári síðani.

Jólaleikurin í ár snýr seg um sjórænarar og jólavættrar. Hvussu leikur fer ... ja, tað fáa tit at vita, tá tit koma í Sjónleikarhúsið í jólamánaðinum ...



Spælt verður yrkadagar kl. 19.00 (tó ikki hósdagar). Í vikuskiftunum verður spælt kl. 17.00.

Atgongumerki á 50,00 kr. fáast í Kunningarstovuni ella í Sjónleikarhúsinum 1 tíma undan sýning.





hví? tí! hví tí? tí tí! hví tí tí? tí tí tí tí!
hví? tí! hví tí? tí tí! hví tí tí? tí tí tí tí!

100=150 og 200=300

Stovningin er lækkað niður á einans **100,-**
Fyll á fyri **100,-** og fá **150,-** ella fyll á fyri **200,-** og fá **300,-!**

...hví? tí! hví tí? tí tí! hví tí tí tí tí...?

FØROYA TELETÍÐ